

## Fyri ein av okkara kundum, sum er eitt framleiðsluvirki, søkja vit eftir stjóra

**Tað verður roknað við at tú, umframt at hava góð samstarvsevnir, hevur:**
- royndir innan søluarbeiði
- royndir innan leiðslu og planlegging
- teldukunnleika á brúkarastøði
- íbirtingarhug og - evnir

Tað er neyðugt at tú hevur koyrikort til bil.

Løn eftir avtalu.

Er hettar nakað fyri teg, so halt teg ikki aftur, men send okkum eina skrivliga umsókn, saman við evt. viðmælum, innan fríggjadagin tann 18. juni 2004, til:

**Sp/f Grannskoðaravirkið
Hermund Jacobsen
skrásettur grannskoðari
boks 16 - 110 Tórshavn
teldupostur: hermund@hermund.fo**

SP/F GRANNSKOÐARAVIRKIÐ
HERMUND JACOBSEN
SKRÁSETTIR GRANNSKOÐARAR

## Gluggaglæma

*faroese craft & design*

*www.craft.fo*

# Føroyskt *Snið & Handverk*

***Søluframsýning í Müllers pakkhúsi 4.–12. sept. 2004***



**Gluggaglæma**
Søluframsýning við livandi verkstaðum verður í Müllers pakkhúsi 4.-12. sept. við fjølbroyttum handverksgreinum, mótasýningum, framførslum og kafé.

**Framsýning í 8 dagar**
Framsýningin verður í 8 dagar við skiftandi framsýnarum. Miðað verður eftir at skapa eina framsýning, ið fevnir um tað gamla siðbundna eins og tað nýggjasta innan føroyskt snið, handverk og handverkslist.

**Sjalskapping**
Innsendu kappingaruppskotini um sniðgeving av **føroyska sjalinum anno 2004** *úr føroyskum tilfeingi* verður høvuðstáttur á dagligu mótasýningunum. Vinnararnir verða kosnir seinasta framsýningardag, sunnudagin 12. sept. kl. 17. Innsendingarfreistin er 15. august. Sí kapping á www.craft.fo / Gluggaglæma.

**Tilmelding innan 1. juli 2004**

**Tilmeldingarblað** fæst á heimasíðuni www.craft.fo ella við at ringja tlf. 514265.

**Luttøka og gjald**
4 dagar á 500 kr. = 2.000 kr.
1. umfar: 4.-7. sept. (leygardag - týsdag)
2. umfar: 9.-12. sept. (hósdag - sunnudag)

**Opið:** kl. 10 - 20, sunn. kl. 14 - 20, mik. stongt (umfarskifti)

Samskiparar: Randi S.Vang & Jónhild Johannessen / Føroya Heimavirkisfelag

# Mini gravmaskina

Alt arbeiði við mini gravmaskinu verður gjørt, so sum urtagarðar, smáir vegstubbar, grava fyri kaðalum, grava út fyri bilhúsum o.a.

Arbeiði við brekkara verður eisini gjørt.

**Fa. Hans P. Hansen**
477 Funningsfjørður
Fá meira at vita á tlf. 212631 ella 441631

*Vit taka minstu uppgávur í størsta álvara.*

## Sálarfrøðistovan

Hoyvíksvegur 65
Postboks 3134 · 110 Tórshavn

***Bílegging av viðtalu kl. 8-9 gerandisdagar á tel 310335 annars á sjálvsvarara***

**Kári Leivsson**
Auoriseraður sálarfrøðingur
- terapeutur IAP umfataður av sjúkrakassasáttmála

# Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álitandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluupp-gávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer, marknaðarleiðara, á tlf. 341800. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 11. juni, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin
Marknaðardeildin
Postsmoga 76
110 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

# Grundstykki ella trøð á Argjum/Tórshavn

**ynskist til keyps.**

Vinarliga upplýs matr. nr., støð og ynski um kostnað.

Skriva til:
**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn
Bill. mrk. 08/06

i

Sosialurin



# Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi 30 tímar um vikuna til Barnagarðin á Teiginum at byrja 9. august 2004.

Tú, sum søkir, kemur at arbeiða við børnum í Miðlon.

Børnini eru í aldrinum 2 -4 ár.

Søkir eingin pedagogur verður hjálparfólk sett ístaðin fram til 31. desember 2004.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, ið er normeraður til 12 barnagarðspláss og 10 vøggustovupláss og 20 útibarnagarðspláss.

**Krøv til umsøkjarin:**
- at tú er fleksibul
- opin og erligur
- dugir at síggja møguleikar fram um avmarkingar
- hevur góð samstarvsevnir.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til leiðaran Randi í Soylu Joensen, tlf. 361750/ 270750.

Umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 22. juni kl. 12.00 og skal sendast til

**Sjálvsognarstovnurin
Barnagarðurin á Teiginum**
210 Sandi

# Lærarar til Sernámsdepilin

Søkt verður eftir 4 lærarum at undirvísa í Skúlanum í Sernámsdeplinum skúlaárið 2004/2005.

Størvini eru tíðaravmarkaði:
3 størv frá 1. august til 31. juli 2005.
Og 1 starv frá 1. septembur til 31. desembur 2004.

Størvini eru við fullum tímatali.

Umsøknir skulu vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi 22. juni 2004.

Størvini verða lønt sambært sáttmálað millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Eyðun Gaard, skúlaleiðara tlf. 223712.

**Sernámsdepilin**

# Hagafundur

Strandahagi hevur aðalfund leygardagin 19. juni kl. 20.00 í skúlanum á Ziskatrøð.
Skrá: Søla av lendi.

**Nevndin**

**Heimarøktin
Vágoy/Norðstreymoy**

# Sjúkrarøktar-frøðingur í Heimarøktini

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi til Sundalagið/Eiði at arbeiða 28 tímar um vikuna í skiftandi vaktum til setan 01. juli 2004.

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur kunnleika og royndir innan arbeiðið í Heimarøktini.

Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólkið í skipanini og við aðrar fakbólkar innan Almanna- og Heilsuverkið. Dentur verður tí lagdur á góð samstarvsevnir.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum í einum øki, sum er í støðugari menning
- Eitt starv har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna sjúkrarøktina

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 333249 ella varðaleiðaran á tlf. 422570.

Løn- og setanartreytir eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi og autorisatión, verður at senda til:

**Heimarøktin Vágar/Norðstreymoy**
Økisskrivstovan, Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

Umsóknarfreistin er 23. juni 2004

## DNG.C6000I SNELLUR

**Í juni og juli mánaði geva vit 11% í avsláttri, við keypi av minimum 2 stk.
AVMARKAÐ NØGD**



**Fa. Jóannes F. Dahl**, **Maskinsmiður,**
**Tlf: +298 422 274, Fax: +298 422 189, Mobil: +298 221 000,
dam-dahl@post.olivant.fo, 460 Norðskála, Føroyar**

U M B O Ð F Y R I Vaki - D N G

**Ps: Vit hava eisini tað vælumtókta Dynama nylon 1,1 mm á 250 m. Línuspøl og aðra útgerð til línu**

# Fíggjarleiðari

**Roknskaparleiðsla og fíggjarstýring**

Til ein av kundum okkara – ein fyritøka við høvuðssæti í høvuðsstaðarøkinum - verður søkt eftir fíggjarleiðara at byrja 1. september. Í Bókhaldinum starvast frammanundan hálvt triðja fólk. Fíggjarleiðslan hevur frammanundan verið partur av øðrum leiðsluuppgávum í fyritøkuni, men økta virksemið hevur gjørt tað neyðugt, at hetta framyvir verður eitt starv burturav.

Talan er um starv í eini fyritøku í støðugari menning. Tann, sum verður settur, kann síggja fram til ein avbjóðandi gerandisdag í dynamiskum umhvørvi, har talan verður um at taka avgerðir innan egið leiðsluøki. Eisini kemur viðkomandi at loysa og samskipa uppgávur saman við øðrum persónum í fyritøkuni.

Umframt at hava ábyrgd av øllum roknskaparøkinum sum heild, er tað eitt krav, at uppgávurnar hjá fíggjarleiðaranum koma at fevna um:
- Roknsparuppseting
- Samskipan og eftirlit við fíggjarætlanum
- Rapportering til nevnd og stjórn
- Skuldarrøkt
- Starvsfólkaviðurskifti innan egið øki

Vit rokna við, at tú hevur góðan kunnleika til alt vanligt bókhaldsarbeiði og –skipanir. Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og leiðsluroyndum hava fyrimun, tó at hetta ikki verður sett sum treyt.

Løn sambært avtalu

Skrivlig umsókn við viðkomandi upplýsingum skal sendast til Rasmussen & Weihe í seinasta lagi tann 20. juni. Áhugaðir umsøkjarar kunnu eisini venda sær til Jóan Magnus Lamhauge, tlf. 351700.

**RASMUSSEN & WEIHE**
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
PRICEWATERHOUSECOOPERS
An associated firm of
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

# Sethús á Strondum til sølu



Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.
Byggiár 1950.
Telefon 448030

T-postur: richjoha@post.olivant.fo